**TIL SØLU**

Mikines málningur frá 1976, sum vísir útsýnið yvir bygdina Kirkja.

Málningurin er at síggja á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo.

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4
100 Tórshavn
Tlf. 311260, fax 311261
e-mail: ge@lawfirm.fo

*Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv., Jóhan J. Lamhauge, adv.*



# Umhvørvisleiðari

Kommunala Brennistøðin sóknast eftir umhvørvisleiðara. Starvið er stápsfunktión við tilvísing til deildarleiðaran og fevnir um arbeiðsøkini umhvørvi, skrásetingar/hagtøl, arbeiðsumhvørvi og kunning.

**Uppgávur**
Nakrar av høvuðsuppgávunum eru at:

- Menna og røkja umhvørvisstýriskipan
- Hava umsjón við umhvørvisgóðkenningunum hjá Kommunalu Brennistøðini
- Skipa fyri umhvørviskanningum og gera árligar umhvørvisfrágreiðingar
- Innsavna og skipa hagtøl yvir burturkast, umhvørviskanningar, óhapp o.a.
- Leggja til rættis kunningartilfar um Kommunalu Brennistøðina, burturkastviðgerð og umhvørvi sum heild
- Kunna og vegleiða viðskiftafólk, áhugabólkar, skúlaflokkar o.o.
- Samskifti við myndugleikar, kanningarstovur, ráðgevarar o.o.
- Dagligur trygdarleiðari og skrivari hjá trygdarnevnd

**Førleikakrøv**
Hægri útbúgving, t.d. verkfrøðingur á akademi/diplom støði innan umhvørvi, evnafrøði, lívfrøði ella líknandi. Kunnleiki til umhvørvistýriskipanir, eins og royndir innan almenna fyrisiting er ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

Góður kunnleiki til EDV eins og koyrikort er ynskiligt.

**Setanarviðurskfti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið verður sett skjótast til ber.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og starvsroyndum skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 9. januar 2007. Merk brævbjálvan „Umhvørvisleiðari til Brennistøðina".

Meiri fæst at vita við at venda sær til Bárð Michelsen, deildarleiðara, ella Janus Isfeld, leiðara á starvsfólkadeildini, á tlf. 302010.

Kommunala Brennistøðin er ein deild av teknisku fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu og hevur ábyrgd av allari burturkastviðgerð í kommununi. Umframt Brennistøðina hoyrir Tyrvingarplássið í Húsahaganum, Jarnplássið og Endurnýtslan á Hjalla til deildina, umframt at deildin tekur sær av rottangatøming. Kommunala Brennistøðin leggur stóran dent á og orku í at avmarka mest møguligt ta dálking, sum stendst av virkseminum. M.a. hevur Brennistøðin júst fingið nýggjan roykreinsiútbúnað, sum lýkur altjóða krøv til útlát. Virksemið hjá Kommunalu Brennistøðini er umhvørvisgóðkent av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**



# Kunngerð

**Broyttur bústaður og skrivstovutíð**

Tann 2. januar flytir skrivstovan á Kommunalu Brennistøðini til Á Hjalla 5.

Skrivstovutíð er mánadag til hósdag kl. 9.00 til 16.00 og fríggjadag kl. 9.00 til 15.30.

**Tórshavnar kommuna**

# Ársins Leiðaradagur '007

26. januar

**- virðisøking við samskifti, samstarvi og samanleggingum**

**Dagurin har leiðarar úr øllum landinum møtast og skapa sær eitt breitt og neyðugt leiðslunetverk!**

Úr milliónini í milliardina, mission possible? - Hví eru nógvar samanleggingar minni væl eydnaðar? - Samanleggingar og samstarv er neyðugt í einum globaliseraðum heimi! - Hjálp, arbeiðsplássið er vorðið ein kaffiklubbur! - Eg eri leiðari, tað stendur á visitkortinum! - Vánaligir leiðarar? Eisini í Føroyum? - Forandringsledelse, it's all about people! Besta stóra arbeiðspláss í DK - Góða arbeiðsplássið og úrslit í verðinsklassa - Ársins Virki 2006 - Skifta kós - Ársins Leiðari '007, kosin í samstarvi við Vinnuvitan



- fyri øll við beini í nøsini...

Tilmelding NÚ!

Synergi

Les meira og tekna teg á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464)

Marner Jacobsen - Richard Mortensen - Hanne Museth - Steen Hildebrandt - Petur Petersen - Alfred Josefsen - Ársins Virki - Ársins Leiðari - Óluva Zachariassen - Netverk